Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Fylgiskjal 24

Dagfesting:	01/09/2025
Mál nr.:	24/15584
Málsviðgjørt:	ABD/SSJ

Uppskot til løgtingslóg um ársroknskap og uppskot til broyting í grannskoðaralógini, vinnufelagalógini, o.a., til hoyringar

Øll vinnufeløg og vinnufyritøkur í Føroyum skulu á hvørjum ári gera ársroknskap ella samtaksroknskap fyri undanfarna roknskaparárið, sum lýkur krøvini í ársroknskaparlógini, heruppií í mun til vav og innihald, roknskaparligar meginreglur, roknskaparflokkar, uppsetan, gjøgnumskygni, krav um grannskoðan, almannakunngering, o.m.a.

Krøvini eru fyrst og fremst galdandi fyri tey 4000+ feløg, sum eru skrásett hjá Skráseting Føroya, umframt eitt avmarkað tal av øðrum sløgum av feløgum og fyritøkum, einstaklingavirkir undantikin.

Galdandi føroyska ársroknskaparlóg er *anordning nr. 1355 af 9. december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven*. Lógin byggir á upprunaligu årsregnskabsloven, sum varð sett í gildi í Danmark í 2001, við seinni broytingum fram til 2007. Upprunalógin frá 2001 er tillagað til krøvini í 4. ES-direktivið um ársroknskapir og 7. ES-direktivið um konsernroknskapir og til meginreglur í altjóða viðurkendu grannskoðanar- og roknskaparstandardunum IFRS ("*International Financial Reporting Standards*").

Uppskotið til nýggja ársroknskaparlóg er fyrireikað við støði í galdandi årsregnskabslov, og í stóran mun eru tað somu ásetingar, sum ganga aftur í uppskotinum til nýggja ársroknskaparlóg, men nú á føroyskum máli. Harafturat verður skotið upp at gera tær dagføringar, sum vinnan og umsitingin á Skráseting Føroya í longri tíð hava vist á, at eru skynsamar at gera.

Mest týdningarmiklu broytingarnar eru:

- Nýggj ársroknskaparlóg verður orðað á føroyskum máli.

- Ársroknskaparlógin verður tillagað til nýggja roknskapardirektivinum hjá ES (direktiv 2013/34/EU, við seinni broytingum), umframt nýggjastu IFRS-standardar. Hetta merkir fleiri roknskapartekniskar broytingar.

- Nakrir umsitingarligir lættar verða gjørdir fyri fyritøkur, heruppií serliga at støddarmørkini í ársroknskaparlógini verða hækkað. Frameftir skal eitt sindur meira til, fyrr enn føroyskar fyritøkur verða fevndar av mest umfatandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Fyri holdingfeløg og íløgufyritøkur, har fíggjarligar inntøkur í minsta lagi svara til nettosøluna, skulu fíggjarinntøkur tó takast við í nettosøluna, tá ið metast skal um, hvønn roknskaparflokk, felagið ella fyritøkan skal gera ársfrásøgn fyri.

- Allar fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini, skulu frameftir lata upplýsingar um miðaltalið av heiltíðarsettum starvsfólkum í roknskaparárinum í ársrfrásøgnini.

- Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at fyritøkur, sum eru fevndar av ársroknskaparlógini, frameftir lata Skráseting Føroya upplýsingar um nettosøluna. Komi er enn ikki á mál við endaliga leistinum fyri, hvussu hendan fráboðan kann fara fram, men Uttanríkis- og vinnumálaráðið leggur seg eftir at finna eina skynsama loysn, ið ikki er ov byrðandi fyri fyritøkurnar, sum skulu fráboða upplýsingarnar.

- Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, at fyritøkur, sum eru skrásettar á einum keypsskála, frameftir kunnu lata ársfrásøgnina inn til Skráseting Føroya á enskum máli.

- Nakrar fylgibroytingar og rættingar verða gjørdar í grannskoðaralógini, vinnufelagalógini, o.a.

Almennu viðmerkingarnar til uppskotið byrja á síðu 163 í uppskotinum.

Uppskotið fevnir ikki um reglurnar um burðardygdsfrágreiðingar, sum vórðu settar í gildi í Danmark í 2024.

18 fylgiskjøl eru til uppskotið. Víst verður til leinkjurnar í skjalinum niðanfyri, umframt til síðu 215 í uppskotinum.

Vinarliga

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Skjal 1

Yvirlit yvir fylgiskjøl:

Fylgiskjal 1: 2000 1 LSF 138 - Ársroknskaparlógin frá 2001, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/200012L00138

Fylgiskjal 2: 2014 LSF 117 - Lov nr. 738 - Nýggja roknskapardirektivið, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/201412L00117

Fylgiskjal 3: 2023 1 LSF 107, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/202312L00107

Fylgiskjal 4: Løgtingsmál 43 2010, sí https://www.logting.fo/mal/mal/?id=5892

Fylgiskjal 5: 2007 2 LSF 100, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/200722L00100

Fylgiskjal 6: Løgtingsmál 105 2014, sí https://www.logting.fo/mal/mal/?id=7619

Fylgiskjal 7: Løgtingsmál 151 2008, sí https://www.logting.fo/mal/mal/?id=4960

Fylgiskjal 8: 2018 1 LSF 99, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/201812L00099

Fylgiskjal 9: 2019 1 LSF 110 - L 642 2020, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/201912L00110

Fylgiskjal 10: 2003 1 LSF 71 - L 99 2004, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/200312L00071

Fylgiskjal 11: 2021 1 LSF 163 - L 695 2022 - §§ 135 a-b, 138 a, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/202112L00163

Fylgiskjal 12: 2008 1 LSF 5 - L 1403 2008 - § 149 a, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/200812L00005

Fylgiskjal 13: Løgtingsmál 46 2013 - Talgilt samskifti o.a., sí https://www.logting.fo/mal/mal/?id=7163

Fylgiskjal 14: 2011 1 LSF 115 - L 477 2012, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/201112L00115

Fylgiskjal 15: 2013 1 LSF 23 - L 1367 2013, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/201312L00023

Fylgiskjal 16: 2005 1 LSF 50 - L 245 2006, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/200512L00050

Fylgiskjal 17: 2007 2 LSF 100 - L nr. 516 2008, sí https://www.retsinformation.dk/eli/ft/200722L00100

Fylgiskjal 18: Løgtingsmál 91 2015, sí https://www.logting.fo/mal/mal/?id=8024